# Kingo kom til sín rætt



**Gospeltúrurin umborð á Norrøna eydnaðist sera væl. Og vónað verður nú, at hann kann endurtakast næsta ár**

SANGFERÐ
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Tað er eitt løgið ljóð umborð á Norrønu hetta kvøldið.

Tú ert staddur á dekki 5 og har frammi hoyrist sangur – ikki vanligur felagssangur, ið ein kennir til.

Her verður fyri tað fyrsta sungið á donskum, og tónarnir verða meiri at kalla drignir út. Men kortini syngja øll í kórinum eitt og sama lag.

Tú kemur nærri móti Arkaduni, og nú er greitt, at her er talan um Kingosang. Og nú kennir tú fólkið, - hetta eru jú Kingosangarar úr Tjørnuvík.

Inni í Arkaduni eru ljóðumstøðurnar av teimum bestu til slíkan sang, og tað hoyrist beinanvegin, at hesi fólkini syngja av hjarta og við megi.

Tey syngja nakrar sangir, og síðani verður plássið latið yvir til yngri sangarar sum syngja eitt heilt annað slag av sangi: Gospelkórið United Voices, sum eisini kann syngja uttan tónleik afturvið.

Fólk lurta við áhuga. Tey klappa eftir hvønn sang, og kunnu bert staðfesta, at fyrsti gospeltúrurin við Norrønu er byrjaður.

Væl byrjaður, eisini.

### Tilvild

Tað var kanska meiri av tilvild at hesin gospeltúrurin gjørdist veruleiki.

Á heysti í fjør fekk Sigrið Sivertsen eina heldur óvæntaða uppringing frá Smyril Line. Í telefonini var Áki Jespersen frá skrivstovuni hjá felagnum.

- Um Sigrið, saman við øðrum, kundi átaka sær at skipa fyri einum gospeltúri í apríl mánaði?

Hetta kom heldur brátt á Sigrið, men hon lovaði so at hugsa um tað og at ringja aftur nakrar dagar seinni.

Eftir at hava umhugsað hetta og eftir at hava biðið nógv um hetta, var avgerðin tikin: Føroyingar skulu eisini sleppa at uppliva, hvussu tað er at vera á einum gospeltúri umborð á Norrønu.

Eitt vikuskifti varð sett á – og tí kundi Norrøna leggja frá landi hóskvøldið í farnu viku við sløkum 800 ferðafólkum, harav ein stórur partur av teimum vóru sangfuglar av ymiskum slagi.

### Havaldan stillað

Hetta skuldi jú verða ein túrur í andaligum umhvørvi, og tí nýtti Sigrið og hini í fyrireikingarbólkinum eisini nógva tíð í bøn og Bíbliulestri fyri túrinum.

Sjálv fekk Sigrið eisini eina váttan um, at tey vóru á rættari leið, tá hon henda eina dagin fekk sær eitt sokallað mannakorn.

Hetta eru smáir hvítir lepar, har eitt skriftarorð stendur á og sum mong hava liggjandi heima í eini krukku.

Hon tók sær eitt slíkt mannakorn og kom tá fram á eitt ørindi úr Sálmunum. Í Sálmi 65, 8 stendur nevniliga: "Tú (Gud) havódn stillir, og bylgjanna bralan".

Nakrar dagar seinni tók hon aftur eitt slíkt mannakorn, og mín sann um hon ikki tá – millum øll hesi 1000 ymisku mannakornini - fekk júst tað sama ørindið: "Tú (Gud) havódn stillir, og bylgjanna bralan".

Onkur heldur, at hetta var meiri tilvild enn nakað annað, tí hvussu stórir eru møguleikarnir annars at fáa sama lepa tvær ferðir í slag. Men hon tók hetta sum eitt prógv um at alt var lagt í Guds góðu hendur, og at tey einki høvdu at óttast fyri á túrinum.

Tað vísti seg tí eisini, at á øllum hesum drúgva túrinum til Hetland, Danmarkar og Noregs var blikalogn allan túrin.

Ja, tað føldist næstan sum skipið ongatíð hevði loyst frá bryggju, hóast siglt var á opnum havi í Norðuratlantshavinum og í Norðsjónum.

# Sama lag við ymiskum tungum

**Øll Norrøna varð tikin í nýtslu undir gospel-túrinum. Her kundi ein ikki ganga langt, uttan at verða møttur av sangi og tónleiki av ymiskum slagi**

SANGFERÐ
*Snorri Brend*

Tað er ikki á hvørjum degi, at tú hevur møguleika at sleppa á gospeltúr við Norrønu.

Og tað er heldur ikki á hvørjum degi, at tú innanfyri fáar tímar – og á avmarkaðum øki - hevur møguleika at hoyra so ymiskar stílartir sum Kingosang, country, svart gospel og ljómandi lovsang.



*Sigrið Sivertsen syngur, meðan fólk njóta ein góðan bita til buffetina*

Tað var júst hetta sum Smyril Line bjóðaði teimum, sum um vikiskifti vóru við á fyrsta gospeltúrinum nakrantíð við Norrønu.

Talan var jú um eitt langt vikuskifti, og tí lá væl fyri hjá fólki at tekna seg til henda serstaka túrin. Tað vísti seg eisini skjótt, at hesin túrurin veruliga rakti ein tørv, tí tað vardi ikki leingi fyrrenn tey mongu kømrini umborð byrjaðu at verða fullteknað.

Tí er ikki óhugsandi, at ein slíkur túrur verður gjørdur aftur eina aðru ferð.

### Breitt úrval

Smyril Line hevur áður skipað fyri ungdómstúrum, countrytúrum og harmonikutúrum, men higartil ikki gospeltúrum.

Hetta var ein roynd hjá felagnum, sum saman við góðum fólki og neyvari fyrireiking, at kanna eftir, um fólk mundu taka undir við slíkum túri. Norrøna siglir jú hóast alt, men hví ikki geva einum slíkum túri eitt ávíst innihald.

Fyrireikingarnar í landi fóru í gongd á heysti í fjør, og skjótt varð komið fram til at ein ynskti at hava eitt breitt úrval av sangstílum og eitt úrval, ið eisini rakti fleiri aldursbólkar.

Á henda hátt varð komið fram til at ein skuldi bæði hava kór, bólkar og solistar við. Og stutt eftir kundi ein avdúka hvørji komu at standa fyri sanginum umborð.

### Blandað

Talan var í fyrstu syftu um tann vælkenda Kingo-bólkin úr Tjørnuvík, sum bæði her á landi og aðrastaðni við, hevur víst á tann týðandi arvin, sum vit eiga í tí eyðkenda Kingo-sanginum. Í øðrum lagi skuldu tey ungu eisini hava sítt, og tí var ikki óvæntað at gosp-